VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Starvsfólk

**Barnagarðurin** søkir 1 pedagog 35-40 tímar/vikuna og 1 pedagog 30 tímar/vikuna frá 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Søkja ongir pedagogar hava vit hjálparfólk til størvini.

Meiri fæst at vita við at ringja til leiðaran, tlf. 317878.

**Vøggustovan** søkir ein pedagog 40 tímar/vikuna í eitt ár frá 15. august. Hjálparfólk 30 tímar/vikuna í eitt ár frá 15. august. Ein avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið 26 tímar/vikuna frá 15. juli.

Søkir eingin pedagogur størvini, verður hjálparfólk sett í staðin.

Meira fæst at vita við at ringja til leiðaran á tlf. 313131.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru er ein sjálvsognarstovnur við 32 børnum í vøggustovuni og 3 stovur við 20 børnum á hvørjari í barnagarðinum.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal vera okkum í hendi seinasta 23. juni 2000.

**Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B, • 100 Tórshavn

# Lærarar til Miðnámsskúlan í Suðuroy

Søkt verður eftir lærara í **evnafrøði** (16 t/v) at byrja á Miðnámsskúlanum eftir summarfrítíðina.

Søkt verður eisini eftir einum vikari í **Alisfrøði og støddfrøði** í tíðini august, september og oktober.

Setanar- og lønarviðurskifti eftir galdandi sáttmála millum YF og Føroya Landsstýri.

Umsóknir við avritum av prógvskjølum v.m. skulu verða skúlanum í hendi 15. juni 2000.

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**
900 Vágur
Tlf. 373622/371001
t-postur: midnam@midnam.fo

# Teknmálsskeið

Í komandi skúlaári skipar Sernámsdepilin fyri ymsum skeiðum í **Teknmáli og Tekn til Talu.**

Yvirlit yvir skeiðini fáast við at venda sær til Sernámsdepilin **tlf. 314522.**

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki, til 4 ára gamalt barn í Eysturoy.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður í dagrøktini, men tó í neyvum samstarvi við foreldrini, Almannastovuna og onnur fakfólk.

Arbeiðið fevnir um at hjálpa barninum í samskiftinum við hini børnini í dagrøktini, at stimbra barninum við venjingum og spæli, og arbeiða við tilfari sum talilærarin vísur á. Stuðulin skal eisini fara við, tá ið børnini fara at svimja og gera aðrar aktivitetir.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Setanartíðin er frá 01.07.00 og fyribils 30.06.2001.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20.06.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
Att: Bettina Christiansen
Heiðavegur
600 Saltangará

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til 314822, Ragnhild Dahl.

# Lærarastørv
## Runavíkar kommunuskúli

Til skúlaárið 2000/2001 verður søkt eftir u.l.7 lærarum. Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Serliga er tørvur á lærarum, sum kunnu undirvísa í:

– teldulæru
– natúru og tøkni
– alis og evnafrøði
– smíð
– danskt
– ítrótt

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 20.6.2000.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum tlf. 447331 ella tlf. 447956.

**Runavíkar Skúlanevnd**
v/ Jákup Hansen
Sýnarvegur
FO 625 Glyvrar

# Heimahjálparafelag Føroya

Frá og við mánadegi 19. juni verður skrivstovan opin hesar tíðir:

Mánadag og mikudag frá kl. 9.00 til 12.00 og fríggjadag frá kl. 13.00 til 17.00.

**Nevndin**

Fíggjarmálastýrið
**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

# Skrivari

Vegna barnsburðarfarloyvi er avloysarastarv sum skrivari hjá stjórnini leyst at søkja til setan frá 1. juli 2000.

**Arbeiðsuppgávur**
Í tøttum samstarvi við stjórnina røkir skrivarin m.a. hesar uppgávur:
- skipar fyri innanhýsis fundum, t.d. skráir, frásagnir og uppfylging
- røkir samskiftið millum økisstjórarnar og stjórnina
- viðger lønarspurningar
- røkir telefonsamskifti og brævaskifti hjá stjórnini, m.a. við norðurlond

Í samstarvi við hinar deildirnar í Stýrinum m.a. eisini hesar uppgávur:
- seta upp rundskriv, lýsingar o.a.
- rættlesa og umseta t.d. brøv, viðmerkingar til lógir o.a.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
- góðar samskiftisførleikar á føroyskum, donskum og enskum
- dugir at nýta Microsoft Word og Outlook — hetta er ein fyrimunur ikki eitt krav
- setir seg skjótt inn í ymisk viðurskifti
- sjálvstøðugan arbeiðsháttt og kann raðfesta arbeiði
- góð samstarvsevni

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 20. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum og ummælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2000.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postboks 2151
165 Argir

Vilt tú frætta nærri um starvið, kanst tú ringja til Marjun R. Simonsen á tlf 35 20 26.

Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna. Stovnurin hevur uml. 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, ið er skipað í 4 deildir og heldur til á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin.


FLOGFRAKT/
SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 32 22 22
Sosialurin - 311820




# Ruddingardagar

Við hesum skal verða sagt frá, at skipað verður fyri almennum ruddingardøgum í Runavíkar Kommunu mikudagin 7. og hósdagin 8. juni 2000.

Heitt verður á øll um at taka lut í ruddingini við at savna saman óruddið, fylla tað í sekkir og seta tað við vegjaðaran har fólk frá kommununi beina óruddið burtur.

Gjørt verður vart við at ruddingartiltakið endar hóskvøldið kl. 19.

RUNAVÍKAR KOMMUNA
**Runavíkar Býráð**

# Kunngerð

Øll tey, sum hava lutir av ymiskum slag, útgerð og annað á havnaøki ella kommunalum øki, verða biðin um at beina hetta burtur í seinasta lagi 20. juni 2000.

Verður ikki gjørt eftir hesum boðum beina Vestmannahavnar Havn og Vestmanna Kommuna útgerð og annað burtur fyri eigarans rokning.

**Vestmannahavnar Havn**
**og**
**Vestmanna Kommuna**

# Stranda Skúli

Søkt verður eftir 5 lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2000/2001, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 13.4. til 26.4.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 20. juni 2000.

**Sjóvar skúlanevnd**
v/ Mass Djurhuus
tlf. 448338
494 Innan Glyvur


KN tag
Det bedste over hovedet...
- også på Færøerne
• Tagpapdækning
• Efterisolering med Rockwool
• Tagrenoveringer
• Tagreparationer
• Renovering af skiffertage
Op til 15 års garanti
Medlem af DTBs Garantifond
KN Tagdækning A/S
www.kn-tag.dk - E-mail: post@kn-tag.dk
Bredalsvigvej 1 • Humlum • 7600 Struer
Tlf. 0045 97 86 17 33 •
Fax 0045 97 86 12 05
Kimsvej 1 • 7500 Holstebro
Tlf. 0045 97 40 19 33
Industrivej 15 • 7700 Thisted
Tlf. 0045 97 92 61 33
Ring og få et godt tilbud.
Kontakt vore medarbejdere på taget hos Ide Møbler, Tórshavn, i juni og juli


**Landssjúkrahúsið**
FO-100 Tórshavn

# Sjúkrasystir

Á med. deild B7 á Landssjúkrahúsinum verður eitt starv sum sjúkrasystir leyst til setan frá 1. juli 2000.

Talan er um starv á lønarbrøki 0,7 í blandaðum vaktum.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Evu Mortensen, deildarsjúkrasystir tlf. 313540 lokal 107.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi skal sendast til

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
Eirargarður 2
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 20. juni 2000, kl. 14.00.


Betri svøvn
BIOflex magnetviðgerð tí:
• BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
• BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
• BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
• BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
• BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!
Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.
Ring 21 79 16
Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí.
Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.

Viðgerð, ið virkar ímóti:
• Øllum slagi av pínu • Vøddastívleika
• Trupulleikum við svøvni • Órógv í blóðrenslinum
• Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar
BIOflex® MAGNETTERAPI
Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.
Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: Vello Føroyar
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

Sosialurin - 311820


**P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ**
**RASMUSSEN & WEIHE**

# Bókhald

Fyri ein av kundum okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum avloysara til bókhald og skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið umfatar bókhald og annars alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Tann, sum settur verður í starvið, má kunna arbeiða sjálvstøðugt. Praktiskar royndir eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 13. juni 2000. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at ringja til Rasmussen & Weihe, lokal 23.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Bilur til sølu

Nissan Primera, árg. 95, við hópin av eykaútgerð, til sølu.

**Tlf. 310767** ella **217406**

Søkt verður eftir

# Handilsfólki

Vit sóknast eftir einum handilsfólki til búnýtisdeildina á Hjalla.
Viðkomandi skal hava áhuga í handilslívinum og vera dugnalig/ur og ágrýtin.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av viðskiftafólki og viðlíkahald av handlinum.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava nakað av royndum við telduarbeiði og vera før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.
Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur hóskandi útbúgving og royndir í handilsvinnuni.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi áðrenn fríggjadagin 09. juni 2000.

**LITAVAL P/F**
Box 1019 • 110 Tórshavn • Tel. 342500
Fax 313847 • E-post: bav@litaval.fo

Sosialurin - 311820